


*Hetta er gæliska alfabetið við 18 bókstavum. Hvør bókstavur er ímynd av einum træi. Tey 17 eru upprunaliga skotskt, og tað 18. ,víntræið, er úr Bíbliuni*



*Lachie Robertsen er ímynd av hesi greinini*

Tá skulu bert trý ættarlið til, inntil málið er horvið. Eitt sum hevur skundað undir hesa gongd er, at fyrr vóru børn happað av ensktalandi, tá tey tosaðu gæliskt. Hetta stuðlaði, sum vera man, ikki undir hugin at læra gæliskt, nú øll skiltu enskt kortini.

### Málið er samleiki

Nú er gæliskt gjørt til eina vallærugrein í fólkaskúlanum á Isle of Skye, og tað eru tey flestu, sum velja tað. Tí er talið á næmingum, sum læra gæliskt, økt úr nærum null í 1984 til gott 2000 í 2005.

Málið hevur eisini nakað við samleika at gera, og tí eru tað fleiri, sum vilja halda fast um fedranna mál, so tað ikki skal fara í gloymskuna. Tað verður eisini førdur ein politikkur fyri at varðveita málið.

Ein lykil til at skapa áhuga fyri málinum er gæliskur tónleikur. Meira hann verður dyrkaður, tess størri verður áhugin eisini fyri málinum. Eitt annað stig er eisini at skipa fyri gongutúrum. Nógv av staðarnøvnunum hava gælisk nøvn, og hetta vekir eisini áhuga fyri at læra meira.

### Eitt gæliskt orð kenna vit øll

Nakað av gæliskum hoyrist í kringvarpinum. BBC hevur eina útvarpsrás, sum bert sendir á gæliskum allan dagin. Okkurt tíðindablað hevur ein »viðskera« á gæliskum einaferð um mánaðin. Vegaskelti eru bæði á enskum og gæliskum, summi eru bert á gæliskum. Tað sama er við almennum lýsingum.

Bløðini hava eisini ein teig við teksti, sum eisini verður lisin í útvarpinum og á hendan hátt ber til lættari at læra úttaluna.

Teldurnar hava fingið gæliskan tekst, men minni verður gjørt enn hjá okkum at skapa nýggj orð. Tí eitur computer eisini computer á gæliskum!

Tað kann eisini verða nevnt, at tað eru fleiri orð á gæliskum, sum eru kend í enskum og øðrum málum. Her er serliga talan um navnið á einum løgi, sum á gæliskum eitur »visqe beatha«, sum merkir »lívsins vatn«. Orðið visqe er nevniliga tað sama, sum vit kalla whisky!

### Lachie vil eisini varðveita gæliskt

Lachie er í somu støðu, sum mong onnur við foreldrum, sum tosaðu gæliskt, og hann vil varðveita teirra samleika, sum merkir, at hann í fyrsta umfari kennir seg sum gæliskan, í øðrum umfari sum skota og síðani sum breta.

Sjálvur er Lachie uppvaksin í eini lítlari bygd á Isle og Skye, sum kallast Elgol. Heima tosaðu tey gæliskt, men tey dugdu sjálvsagt eisini enskt. Lachie eigur tvey børn, og hann roynir at fáa tey at læra seg gæliskt, og tað gongur væl. Hann er giftur enskari konu, og hevur hon roynt at læra seg gæliskt, men hetta hevur verið sera trupult, og tí er tað lættari at tosa enskt heima.

Annars verður roknað við, at umleið 40% av fólkinum á Isle of Skye og har á leið tosa meira ella minni gæliskt.

Umrøddi háskúli, sum Lachie nú gongur á, hevur einar 150 næmingar innan ymisk øki, og hann verður roknaður sum ein týdningarmikil liður í royndini at varðveita gæliska málið.

Høvuðsvitjanin hjá føroyska bólkinum var á gæliska lærda háskúlanum, har greitt varð frá skúlanum.

Hann varð byrjaður í 1973, og tá hann varð vigdur, var Óli Breckmann, sum tá las í Bretlandi, til staðar. Síðan er hann útbygdur fleiri ferðir, og tað verður hann fram-vegis. Væl man hava riggað, tí skúlin fekk ein prís frá sjálvari drotningini í 2002.

Útboðið er eisini stórt. Her kann veljast millum 13 styttri og longri skeið. Skeiðini umfata alt frá gæliskum máli og til skeið í gæliskari mentan og tónleiki.

Talið á næmingum er eisini stútt vaksandi. Í ár verður roknað við 1135 næmingum. Av hesum eru teir 800 sum taka styttri skeið niður til eina viku. Eisini verður boðin fjarlestur.

Her er eisini eitt bókasavn við teimum bókum, sum eru skrivaðar á gæliskum. Mett verður, at talið liggur um 1000. Árliga útgávan av bókum, sum koma út á gæliskum, er seks! Meðan tað eru 150 á føroyskum.

Tað ber eisini til at búgva á skúlanum fyri ein rímiligan pening.

Í miðal eru her 100 næmingar.

Hetta merkir sjálvandi eisini lokala samfelagið á øllum økjum frá handlum til kirkjur.

### Íkast til samfelagið

Háskúlin gevur eisini nógv arbeiðspláss. Tað eru 78, sum hava fulltíðararbeiði, meðan 104 hava parttíðararbeiði. Hetta gevur einar 18 mill kr. til tann lokala búskapin. Samlaði raksturin kostar einar 40 mio krónur. Av hesum rindar staturin umleið helvtina, meðan restin má útvegast á annan hátt, millum annað við skeiðsgjaldi, sum er rættiliga rímiligt. Eitt vikuskeið kostar góð 100 pund ella góðar 1.100 krónur.

Gæliski háskúlin vil fegin hava samstarv við Føroyar, sum tað varð greitt frá í Sosialinum týsdagin.

Tey sum berjast fyri gæliskum máli halda seg hava nógv at læra av føroyingum á hesum økinum, og tað er uttan iva stórur vilji til at hjálpa teimum, tað sum vit kunna.

Tað sæst í lokala blaðnum West Highland Free Press, at tað er rættuliga nógv annað virksemi til frama fyri gæliska málið.

Í apríl varð árliga Celtic Media Festival hildin, har nógv varð gjørt burtur úr eini nýggjari sjónvarpsrás á gæliskum, sum er í umbúna.

Eisini er gjørdur ein filmur á gæliskum við 16 ára gomlu Anni Macleod í høvuðsleiklutinum. Filmurin varð frumsýndir her. Filmurin hevur seinni verið sýndur á filmfestivali í Cannes og fekk góð ummæli.

Nú vit hava fingið samband við Isle of Skye fara vit kanska at frætta, hvat ið hendur á hesum økinum.

Elektrikkari

**Vegna vaksandi virksemi, sóknast vit eftir sveini.**

**Vit vænta at tú:**
- ert arbeiðssamur
- hevur royndir innan økið
- ert álítandi
- ert fyrikomandi
- ert samarbeiðsvilligur
- ert førur fyri at taka avgerðir

**Vit kunnu bjóða tær:**
- eitt spennandi og avbjóðandi starv
- eitt gott arbeiðsumhvørvi í eini fyritøku í menning.

Hevur hetta tín áhuga, kanst tú ringja til Oddur á telefon 505882.

KEV

**Kongshavnar El-Virkið**
Gulasteinsvegur 30 · FO-610 Saltangará
t-postur: kev@kev.fo

Lærlingur

KEV leitar eftir góðum lærlingum innan el.

Ert tú opin og erligur, hevur rímiligan kunnleika til teldu og hug at arbeiða innan el, ynskja vit at frætta frá tær.

Fyrimunur er, um tú hevur SIT.

Send okkum eina skrivliga umsókn við avriti av prógvum v.m.

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 8. juni.

Hevur tú okkurt at spyrja um, kanst tú ringja til Oddur á telefon 505882.

KEV

**Kongshavnar El-Virkið**
Gulasteinsvegur 30 · FO-610 Saltangará
t-postur: kev@kev.fo